

*Teitur prógvaði leygarkvøldið, at hann er eitt tónlistarfólk í heimsflokki*

# fyri rest

kundi tað lættliga verðið, um ikki tað var fyri sangin hjá Teiti og fangani melodilinjurnar. Meðan ljóðførinum komu inn og út í óvæntaðari raðfylgju, so stóð røddin sum ein klettur mitt í ljóðmyndini og bant alt saman.

### Krevjandi tónar

Framførslan var deild upp í tvey. Stórt sæð bara løg av 'The Singer' vóru spæld út í eitt frá byrjan av (I Run The Carousel undantikið), og síðani varð dúgliga hálað fram av gomlum perlum (The Singer undantikið). Ein raðfylgja, ið kendist natúrlig.

Sum sagt, so er alt tað nýggja meiri abstrakt og ótraditionelt enn tað, ið Teitur áður hevur gjørt. Tað er spennandi og ókent, men krevur eisini rættiliga nógv av áhoyraranum. Tú skal alla tíð fylgja við, hvat hendir. Serliga tá ið nýggja fløgan, ið kom út fáar dagar áðrenn konsertina, ikki hevur havt tíð til at sodna ordiliga.

Tí kendist tað eitt sindur sum at koma niður á jørðina eftir eina turbulenta flogferð, tá konsertin var hálvrunnin. Sum at blaka seg á sofuna eftir ein strævnan dag. Puff!

### Onkuntíð fellur alt uppá pláss

Við fimm útgávnum aftanfyri seg hevur Teitur eina skjáttu, fulla av perlum. Og tað legði tú merki til hetta kvøldið, tí einki lag datt ímillum. 'Josephine', 'Louis Louis', 'One and Only' og restin av hittunum komu slag í slag. Góðska, góðska, góðska...

Tó kom hæddarpunktið móti endanum, tá ið allir tónleikararnir fóru av pallinum, og Teitur fór í holt við 'The Singer'. Eingi ljóðføri, einki nakað. Bara Teitur:

I've always had the voice
And now I am a singer
The audience grows silent
When I open my mouth

Tað er ikki ofta, at tað hendir, og so avgjørt ikki á hvørjari konsert, men onkuntíð fellur alt uppá pláss, og tónleikaupplivingin gerst meiri enn ein uppliving. Tú merkir tað frá nakkanum og niður í føturnar. Huglag, hýrur, ljóð, høli, ljós - alt skal ganga upp í eina hægri eind.

Og eina løtu, meðan klantra-sligi havnarmaðurin stóð í sínum rukkaða klædningi og sang um at syngja fyri øðrum, fall alt í hakk. Tílíkar løtur festa seg í minnið.

### Lýtaleyst undirspæl

Tað hevði ikki verið rætt av mær at skrivað eitt ummæli av kvøldinum og ikki nevnt teir fimm tónleikararnar, ið spældu við Teiti.

Umframt áðurnevnda Helga Jónsson (trombon/gittar/xylofon/melodika/sang), so tóku Mikael Blak (bass) og Derek Murphy (trummur) sær av grundini, meðan Unnur Jónsdóttir (klarinett/gittar/xylofon/sang) og unnusta Teiturs Anna Emilsson (saksofon/sang/klaver) løgdu róman.

Sum lesarin sær, so høvdu tey trý, Helgi, Unnur og Anna, úr at gera við at skifta ljóðføri. Tað var so at siga ikki ein sangur, har sama samansetingin av ljóðførum varð nýtt. Men tað gekk smidliga fyri seg, og tey komu væl frá tí. Skal fingurin setast á nakað, so var kórsangurin eitt sindur falskur til tíðir, men tað var eisini tað. Saman ruddaðu tey fimm vegin fyri Teiti.

### Ljóst framman stavn

Teitur prógvaði leygarkvøldið, at hann er eitt listafólk í heims-flokki. Eg havi verið til nógvar konsertir seinasta árið við altjóða nøvnum, og Teitur stendur ikki petti aftanfyri hesi.

Við nýggju fløguni í aðrari hondini og eini frálíkari live-framførslu í hinari kann ikki vera annað enn ljóst framman fyri stavn hjá Teiti.



*Meðan ljóðførinum komu inn og út í óvæntaðari raðfylgju, so stóð røddin hjá Teiti sum ein klettur mitt í ljóðmyndini og bant alt saman*

## Setlisti

Guilt By Association
Your Great Book
We Still Drink The Same Water
You Should Have Seen Us
Don't Let Me Fall In Love With You
Legendary Afterparty
I Run The Carousel
Letter From Alex
Catherine the Waitress
Start Wasting My Time
I Was Just Thinking
Josephine
Louis Louis
Hitchhiker
One and Only
The Singer
Andvekur
All My Mistakes
Great Balls of Fire
Let's Go Dancing